NÝGGJAR FLØGUR

PRETTY MAIDS – Scream



Sony Music ● ● ● ● ● ○

Ronnie Atkins, Ken Jackson, Michael Fast og Kan Hammer vóru fyri nøkrum árum síðan 4 blaðungir danir úr Horsens, sum vildu at fara hin «tunga vegin» tónleikaliga. Heiti sum «Don't turn your sex on me», «Adrenalin Junkie» og «Psiyo-time-bomb planet-earth» bera eisini boð um at talan er um heavy-tónleik. Scream er eitt sera flott verk, og sigast má, at Pretty Maids hava funnið javnvág millum heavy metal og hin meira visukenda rock tónleikin. Lagini «Walkaway», «In a world of your own» og «Anytime anywhere» eru í besta «West coast»-stíli. Eitt pluss er, at fløgan er sera ódýrsk.


E-TYPE – Made in Sweden



Stockh. rec. ● ● ● ○ ○ ○

E-Type er ein bólkur av svium, sum fylgja í fótasporunum hjá Dr. Alban og Ace of Bace. Tónleikurin er «heimagerður» og sjálv-producerað. Tað er ein harri, somuleiðis nevndur E-Type, sum stendur fyri tónleikinum og útgávuni. Tónleikurin er «Hip-Hop» í besta svenska stíli, har lagið «This is the way» man vera hitt kendasta. Ikki er serliga nógv hugflog yvir tilikum lidnaðar poppi, men sviar hava funnið stevið og tiskil er tónleikurin í dag ein hin stærsta útflutningsvøran í Sverriki.

TEN SHARP – Shop of memories



Columbia records ● ● ● ○ ○ ○

Bólkurin Ten Sharpe man vera mest kendur her á leiðum við lagnum «You», sum er ein moderna «Elton John útgáva». Nýggjasta fløga teirra er sera pen, úr enda í annan. Men sera eintáttað er henda útgávan, og bólkurin hevur ikki endurnyggjað seg nakað serligt síðan seinastu útgávuna. Løgini «After all the love has gone» og «Whenever I fall» skara tó framúr.

YMISK – Born to be wild 3



MC Records ● ● ● ● ○ ○

Hetta er, sum heitið sigur, triðja útgávan í røðini Born to be wild, uppkallað eftir kenda lagnum hjá «Steppenwolf» úr filminum «Easy Rider». Á hesi uppsamling eru m.a. navn sum Deep Purple, Alice Cooper, Foreigner, Bad Company, Scorpions og Marillion. Fløgan er ett gott ikast til samlingina, og er stak bilig í prísi.

Fløgutíðindi

TOP 15
SELDAR FLØGUR
* hesa vikuna *

1. VAN HALEN / Balance (1) 3. vika
2. THE COMMITMENTS / Filmsfl. (3) 4. vika
3. YMISK / Born to be wild (2) 4. vika
4. DEEP PURPLE / Smoke on the ... (5) 2. vika
5. CRANBERRIES / No need to... (4) 9. vika
6. YMISK / Born to be wild 3 (7) 2. vika
7. YMISK / 1994 Hit mix (6) 2. vika
8. A. L. WEBBER / The best of (Nýggj) 1. vika
9. EAGLES / Hell freezes over (8) 11. vika
10. YMISK / Now 29 (inn aftur) 9. vika
11. SMOKIE / Don't play that game with me (12) 2. vika
12. STING / The Best of (14) 9. vika
13. OFFSPRING / Smash (11) 2. vika
14. AEROSMITH / Big ones (15) 13. vika
15. BOYS II MEN / II (9) 2. vika

Vika 10, kelda: F. C. Búðin

Van Halen best umtóktur í løtuni

Nummar eitt á tí føroyska fløgulistanum eru, uttan kapping, kanadisku Van Halen. Hetta er aðru ferð á rað, at teir liggja nummar eitt og tað tykist sum fólk hava tikið avbera væl ímóti nýggjasta útspæli teirra, Balance. Núverandi sangarin, Sammy Hagar, tykist ikki standa aftan fyri undangongumann sín, David Lee Roth, og lp-fløgan Balance er ein hin besta, bólkurin hevur givið út, bæði í góðsku og originaliteti. Slíkt hevur altíð við sær, at spennandi er at bíða eftir næsta verkinum. Hetta man tó ivaleyst vera langt frammi í tíðini.

SINGLE TOP 15
* í Danmark *

1. JOHN SCATMAN Scatman
2. INI KAMOXE / Here comes the hot
3. MARK OH / Tears don't lie
4. BOYZONE / Love me for a reason
5. CRANBERRIES / Zombie
6. EAST 17 / Stay another day
7. DION CELINE / Think twice
8. ZIG ZAG / them girls
9. REDNEX / Old pop in an oak
10. CAPTAIN HOLLYWOOD / Flying high
11. SWING / Sweet dreams
12. OFFSPRING / Selv esteem
13. 2 IN A TENT / Cleaning windows
14. ANNIE LENNOX / No more I love you
15. REDNEX / Cotton eye Joe

Vika 10, kelda: F. C. Búðin

Born to be wild-serian

Ongantíð hava verið so nógvar ymsar uppsamlingar at fingið sum júst nú. Ein hin kendasta serian í løtuni er rock-serian Born to be wild. Í hesum døgum er nummar trý í røðini at fáa í fløguhandlunum, og hon inniheldur, eirs og hinar, 18 kend rock løg við eins kendum bólkum. Ein orsøk til at hesar fløgur eru so populerar millum manna er at bert sokallað »gomul hit« eru á teimum, í eini flottari blanding. Ein onnur orsøk er sjálvsagt, at vegleiðandi prísurin fyri eintakið bert er 128,- kr. Born to be wild 3 er við undir heitinum »Nýggjar fløgur« hesaferð.

»Nýggj« útgáva við Queen

Tað er í hesum døgum sera populert at geva gamlar upptøkur út, sum ikki hava sæð dagsins ljós fyrr, við upploystum bólkum. Her kunnu vit minna á verkið »Live at BBC«, sum vóru gamlar upptøkur við sjálvum Beatlunum. Nú sigst, at gamlar upptøkur við Freddie Mercury og bólkinum Queen eru á veg. Upptøkurnar vórðu gjørdar einaferð í sjeytiárunum, men av tí at Freddie Mercury nýtti fremmanda arbeiðsmegi, uttan loyvi frá ensku stjórnini, varð forboð sett fyri at geva tilfarið út tá. Nú eru so innspælingarnar á veg út á fløgu. Spennandi verður, um góðskan stendur mát við tað, sum Freddie Mercury og Queen annars hava lagt navn til. Í øllum førum verður hetta verk eitt sokallað »samlara objekt«.

Deep Purple, aftur-vendandi popularitetur

Ein hin best umtókta fløgan í løtuni er »Smoke on the water«, ið er uppsamlingsfløga við bólkinum Deep Purple. Útgávan líkist nógv eini eldri uppsamling, ið nevnist »Deepest Purple«, og kom út í 1981. Tó eru fleiri løg á hesaferð og minnast skal á, at møguleiki er fyri fleiri løgum, tá talan er um fløgur enn tá útgávan er í vinyl. Men Deep Purple við Ian Gillian á odda mugu sigast at hava fingið aftur-vendandi popularitet í hesum døgum.

Komandi fløgur

Vit hava, sum vant, ein útvaldan lista yvir tær fløgur, sum kunnu væntast at koma til Føroya í næstum. Fløgurnar koma út í Danmark í vikunum 11–13, og kunnu væntast at vera í Føroyum umleið eina viku til 14 dagar seinni:

STEVE WONDER / Conversasion Peace (vika 11 í Danmark)

WET WET WET / Julia's song (vika 11 í Danmark)

RADIOHEAD / The bends (vika 11 í Danm.)

MEGADEATH / Bonus album (vika 11 í Danm.)

MIKKEL NORDSØ BAND / Live 1995 (vika 12 í Danmark)

DURAN DURAN / Thank You (vika 13 í Danmark)

YMISK / Come together (vika 13 í Danmark)

HIGHWAYMEN / Ókent heiti (vika 13 í Danmark)

SEBASTIAN / Best of (vika 13 í Danmark)

Hesar eru so tær útgávur, sum vit kunnu vænta okkum í nærmastu framtíð.

Hendan greinin verður annars aftur, sum vant, hósdagin. **fj**

BILLUTIR
útvegast til
FLEST ALLAR BILAR
Fa. BILLUTIR
Tlf. 21605 Fax. 21666

SLEÐUR
Stórt úrval av KAVASLEÐUM á goymslu
Heil- & smásøla
P/F PW-ÍSINKRAM
Tlf. 41166 - 84166

Føroyar í hækkandi sól



Vónir birtast –
fyri ljósari tíðum –
vársól bjørt á fjallalíðum –
skinið kínir aldubrot á firðum.

Trúføstu vinir –
flúgvandi fuglar – útlúgvaðir av havsins hvirlum
tit nomu land í skyggjandi stjørnulýsi –
verið vælkomnir heim á klettar okkara.

Føroya synir og døtur heima og í útlegd –
gloymið ikki føðiland okkara, at standa saman
gevur styrki, tá neyðin er størst, er hjálpin næst.
Alveldisdrottur signing okkum gev.

Viggo Olsen